# ítróttur

Nr. 19 • mikudagur • 29. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jón Rói tættari at einum Brøndby-sáttmála

**Eftir søluna av framherjanum Peter Madsen til Wolfsburg, tykist møguleikin vera størri fyri, at Jón Rói Jacobsen fer at gera sáttmála við danska meistaraliðið**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Mánadagin kunngjørdi danska meistarliðið Brøndby, at Wolfsburg úr Bundesliguni hevur skrivað sáttmála við framherjan Peter Madsen. Talan er fyrst um ein leigu sáttmála til í summar, har møguleiki so verður hjá týska felagnum at keypa danska framherjan frá Brøndby.

Leikaraskiftið hjá Peter Madsen, skuldi havt við sær, at Jón Rói Jacobsen skuldi verið tættari at einum sáttmála við Brøndby. Brøndby er í svárari fíggjarligari kreppu, men við søluni av Peter Madsen, hevur felagið meira av pengi at ráða yvir.



*Um talan verður um ein Brøndby-sáttmála hjá Jón Róa Jacobsen, fáa vit svar um innan eitt døgn, sigur Birgir Enghamar, formaður í HB*

*Mynd: Savnsmynd*

### Avgjørt um eitt døgn

Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, váttar fyri Sosialinum, at samband hevur verið millum partarnar, síðan mánadagin. Hann væntar at kunna geva endaligt svar innan 24 tímar um fótbóltsframtíðina hjá Jón Róa Jacobsen.

– Vit hava diskuterað nøkur smáting, og formaðurin í HB váttar, at HB og Brøndby eru ikki langt frá hvørjum øðrum. Spurdur um talan verður í fyrst atløgu um ein leigusáttmála ella um eina sølu alt fyri eitt, vil Birgir Enghamar hvørki vátta ella avsanna.

Heldur ikki vil formaðurin í HB svara, um talan verður um stóra peningaliga upphædd, um leikaraskiftið hjá Jón Róa skuldi verðið veruleiki, og sigur í stuttari viðmerking, at slíkir upplýsingar verða millum feløgini bæði.

### Óvist við Mads Jørgensen

Ein annar av stjørnuleikarunum á meistaraliðnum hjá Brøndby, Mads Jøgernsen, hevur eisini ætlanir um at royna eydnuna uttanfyri Danmark. Hann hevur boðað Brøndby-leiðsluni frá, at hann ikki er sinnaður at leingja sáttmálin, sum rennur út í summar.

Mads Jørgensen hevur verið settur í samband við italska felagið Perugia, men enn er onki ítøkiligt spurt burturúr. Av tí Mads Jørgensen verður leysur av sáttmála sínum við Brøndby í summar, fær Brøndby ongar pengar fyri leikaran, og tað má kennast svárt, tá fíggjarstøðan í felagnum ikki er tann besta.

# Seinnu hálvfinalurnar í kvøld

**Kyndil hevur longu tryggjað sær sess í steypafinaluni, meðan í hálvfinaluni millum STÍF og VÍF er onki avgjørt**

COCA COLA CUP-KAPPINGIN
*Páll Holm Johannesen*

Seinnu hálvfinalurnar í steypakappingini hjá monnum verða leiktar í kvøld. Kyndil møtir triðjudeildar liðnum hjá KÍF í Hoyvíkshøllini, meðan StÍF fær vitjan av VÍF. Fyrri dysturin millum Kyndil og KÍF endaði við sannførandi 44-23 sigri til Kyndil, og tí skuldi dysturin verið ein avgreiðslu spurningur hjá Kyndli.

Hinvegin er lagt upp til ein sannan gysara á Skála í kvøld. Fyrra hálvfinalan endaði við einum teprum 24-23 sigri til strandingar, og tí er onki avgjørt undan dystinum. Spennandi verður um strandingar triðja árið á rað klára at tryggja sær finalusess, ella um vestmenningar fara at steðga teimum.

Báðar hálvfinalurnar byrja kl. 20.00. Dómarar á Skála verða Sámal Hansen og Kristian Johansen úr Neistanum, meðan Kári Hansen og Trúgvi Mortensen úr Tjaldrinum døma dystin millum KÍF og Kyndil í Hoyvíkshøllini.



*Lagt er upp til ein sannan gysara á Skála í kvøld, tá oddaliðini í landskappingini STÍF og VÍF bresta saman í seinnu hálvfinaluni í steypakappingini.*

*Mynd: Savnsmynd*



# Eyðun Samuelsen skiftir til AB

**Hóast skiftið til AB er eitt stig niður, so er Eyðun Samuelsen spentur um uppgávuna á Argjum.**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannsen*

Kviki framherjin, Eyðun Samuelsen, fer í ár at spæla í AB. Hóast papírarbeiðið ikki rættiliga er avgreitt enn, so er greitt at Eyðun ikki verður í HB í ár.

Eyðun Samuelsen var partur av meistaraliðnum hjá HB í fjør, so skiftið til AB er eitt stig niðureftir. Sjálvur sigur Eyðun seg vera spentan um uppgávuna, og vónar AB fer at standa seg væl í ár. – At fara frá fyrstu deildar fótbólti til at spæla í aðru deild er eitt vet niðureftir, men AB hevur eitt spennandi lið og góðar umstøður, og tí gleði eg meg til kappingarárið í ár.

Argjamenn flutti upp úr triðju deild í fjør, og felagið ætlar at nýta árið í ár at etablera seg í 2.deild, áðrenn síðsta takið verður tikið mótvegis uppflyting í fremstu deildina.

Umframt Eyðun Samuelsen, so arbeiðir AB í løtuni við at fáa aðrar spælarar til felagið.



*Kviki framherjin, Eyðun Samauelsen, fer komandi ár at spæla í AB*

*Mynd: Savnsmynd*

# Christian Høgni til Kina

**Vejle fer heilt til fjareystur á venjingarlegu, og tí er lítið sannlíkt, at Christian Høgni Jacobsen verður við á venjingarlegu hjá fótbóltslandsliðnum í Spania.**

VENJINGARLEGA
*Páll Holm Johannsen*

Heimasíðan onside.dk skrivar, at felagið hjá Christiani Høgna Jacobsen, Vejle Boldklub, fer á venjingarlegu í Kina í døgunum 18.-28 februar. Venjingarlegan verður í stórbýnum Shanghai, og ætlanin er at spæla tveir dystir ímóti fyrstu deildar liðum úr býnum.

### Neyvan við til Spania

Av tí, at venjingarlegan hjá føroyska fótbóltslandsliðnum í Spania verður um somu tíð sum venjingarlegan hjá Vejle, er væntandi, at Christian Høgni velur ferðina til Kina frammum.

Vanliga hevur landsliðsvenjarin verið noyddur at verið útisetanir fyriuttan til venjingardystirnar í byrjani av árinum. Útlendsku feløgini, ið hava vetrarsteðg, fyrireika seg til várhálvuna, og tí má føroyska landsliðið dúva á leikarar úr heimligu kappingini.

Tað er tó ein sannroynd, at útisetarnir á landsliðnum eru fækkaðir í tali seinastu árini. Umframt Christian Høgna, so er tað bert Jákup Mikkelsen, sum spælir uttanfyri Føroyar. Um hann verður við á venjingarlegguni í Spania er enn óvist.



*Christian Høgni Jacobsen og Vejle fara heilt til Fjareystur á venjingarlegu í komandi mánað.*

# KÍ gjørt sáttmála við Kristian í Vági

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Leirvíkingurin, Kristian í Vági, fer í ár at umboða KÍ. Evnaríki framherjin hevur skrivað ein eitt-ára sáttmála við KÍ. Kristian í Vági hevur ikki gjørt so nógv við fótbóltin seinastu árini, men hevur avgjørt at royna seg í fremstu deildini í ár. Umframt fótbólt, so hevur Kristian fingist nógv við tónleik, har hann er limur í Eysturoyar bólkinum Flux.

Kristian hevur nakrar U-18 landsdystir á baki, og síðst í níti árinum var hann ein av stuðulsleikarunum á LÍF-liðnum, sum tvey ár á rað endaði á øðrum plássi í 2.deild. Spennandi verður at fylgja við, hvussu nýggi KÍ-leikarin fer at standa seg í fremstu deildini í ár.

Sosialurin
www.sosialurin.fo